# SOSIALRÁÐGEVI á ALMANNASTOVUNI

Søkt verður eftir 2 sosialráðgevum til Almannastovuna.

**Ein til økisdeildini í Eysturoy at arbeiða hálva tíð frá 1. september fyribils árið út.**

Um deildina.
Á økisdeildini í Runavík eru 7 fólk.

Arbeiðs- og ábyrgdarøkið hjá deildini er, at:
- ráðgeva og vegleiða borgarum um rættindi og skyldur í sambandi við almannaspurningar
- seta í verk fyriskipanir sambært almannalóggávuna
- í serligum førum vísa til landsumfatandi eindirnar hjá Almannastovuni

Tær sosialu fyriskipanirnar, ið økisdeildin serliga tekur sær av, eru
- ymiskar fyriskipanir sambært forsorgarlógini
- persónliga viðbót til pensiónistar sambært pensiónslógini
- samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima
- tilráðingar í smb. við umsóknir um fyritíðarpensiónir

Økið hjá deildini er Eysturoy

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Egil G. Olsen, deildarleiðara á tlf. 474710.

**Ein til Arbeiðsmarknaðardeildina, Tórshavn, avloysarastarv.**

Søkt verður eftir einum sosialráðgeva til starv á Arbeiðsmarknaðardeildini at byrja 1. september 2004 ella sum skjótast. Talan er um avloysarastarv fyri fólk í barnsburðarfarloyvi.

Um deildina.
Á Arbeiðsmarknaðardeildini eru 8 fólk.

Arbeiðs- og ábyrgdarøkið hjá deildini er, at:
- geva almenna ráðgeving og vegleiðing um stuðulstiltøk innan almannaøkið
- ráðgeva og vegleiða í samband við arbeiðsmarknaðin
- viðgerð av fíggjarligum veitingum
- gera virkisætlanir fyri at fáa fólk út á arbeiðsmarknaðin
- gera tilráðingar viðvíkjandi fyritíðarpensión
- uppfylging og tilráðing í dagpeningamálum tá talan er um varandi sjúku
- tilráðing og uppfylging í endurbúgvingarmálum
- tilráðing og uppfylging viðvíkjandi vardum størvum, arbeiðsroyndum o.l.

Starvið inniber ferðing til økisdeildinar kring landið.

Nærri fæst við at venda sær til Tórgerð Nielsen, stjórnarskrivstovan, tlf. 35 35 10.

Fyri bæði størvini er galdandi:

Førleikakrøv
- sosialráðgevaraútbúgving
- góður kunnleiki til EDV á brúkarastøði
- góður málburður í føroyskum, bæði munnliga og skrivliga
- góð samstarvsevni

Lønar- og setanarviðurskifti
Setanar- og lønarviðurskifti eru sambært sáttmálan millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Umsóknarfreist
Fyri bæði størvini er galdandi at umsóknarfreistin er 26. juli 2004.
Umsóknir við avriti av prógvum o.ø. skulu sendast Almannastovuni, postsmoga 3096, Jónas Broncksgøta 27, FO-110 Tórshavn.

**Um Almannastovuna**

*Fyri at betra um tænastustøðið hevur Almannastovan framt bygnaðarbroytingar, har fleiri tænastur eru lagdar út á økini, soleiðis at viðskiftafólk og stovnar fáa lættari atgongd til tænasturnar.*
*Høvuðsuppgávan hjá Almannamiðstøðunum er at geva almenninginum ráð og vegleiðing um rættindi sambært almannalóggávuni eins og at taka avgerðir.*
*Almannastovan hevur fakligu, fyrisitingarligu og fíggjarligu ábyrgdina av veitingum, fyriskipaðar eftir pensjón- dagpeninga- og forsorgarøkinum v.m.*
*Stovnurin umsitur fyri umleið 800 mill. kr. og her arbeiða umleið 100 fólk.*
*Almannastovan hevur almannamiðstøðir í Tórshavn, Suðuroy, Eysturoy og í Norðoyggjum, og harumframt fevnir stovnurin um Hjálpartólamiðstøðina og aðrar landsdekkandi serdeildir.*

# Heystskeiðið 2004

***6 vikur frá 1. september til 8. oktober við upplivingum, avbjóðingum og andarúmi***

Føroyskt, Tekstil, Svimjing/Gongutúrar, Filmur, Teldulæra, Søga, Filosofi, Málningalist, Smíð, Tilevning, Skriviverkstaður, Savnsvitjanir og ein Námsferð.



Kostnaður: kr. 4.750,-, alt íroknað.

Set teg í samband við okkum um gjøllari upplýsingar og innskrivingarblað!

***Føroya Fólkaháskúli***
*Háskúlavegur 14 - FO 100 Tórshavn*
*Telefon 311743 - Telefax 319687*
*E-Mail: ffh@skulin.fo*
*Heimasíða: www.skulin.fo/ffh*

SOSIALURIN Í VÁGUM



Vegna summarfrí er Vágaredaktiónin stongd til tann 16. august

Avgreiðsla er á høvuðsredaktiónini

Sosialurin
boks 76 · 110 Tórshavn
tel 34 18 00 · fax 34 18 01
teldupost: post@sosialurin.fo

**Sosialurin**

ARGJAVEGUR 26 · TEL 341800 · FAX 341801 · T-POST: POST@SOSIALURIN.FO

www.sosialurin.fo



# Bayliner 2755



til sølu um hóskandi boð fæst.

**Tlf. 218302**

# Motorsúkkla til sølu

Honda Revera NTV 600, árg. 91, í góðum standi til hægst bjóðandi. Prísuppskot uml. 35.000 kr.

**Tlf. 456413**

# Til sølu

10 Tivolibásar til sølu um hóskandi boð fæst. Verður selt saman ella hvør sær.

Kunnu síggjast á G! Festivalinum.

**Bygdafelagið Ternan á Viðareiði**
Tlf. 223558 ella 507765

# Hús ynskjast til keyps

Hús í Havn ynskjast til keyps. Húsini skulu helst vera í góðum standi. Ynskiligt er, at handilin fer fram skjótt.

**John Johannesen**
tlf. 219870

# Til sølu

Silvurgráur Toyota Corolla 1.9 E diesel stationwagon frá 09/00 verður hervið lýstur til sølu, um nóg høgt boð fæst.

Bilurin hevur koyrt 54.500 km.

Áhugað verða biðin um at venda sær til

**Advokatskrivstovuna**
Fr. Petersensgøtu 9
100 Tórshavn
att. Jens Andrias Vinther, adv. ft.,
e-mail jav@jura.fo
ella
Birnu Joensen, skrivara, e-mail bij@jura.fo

SKEMMAN

# Søkir handilslærling

Gerst handilslærlingur hjá okkum og fáa nógvar fyrimunir!

**Vit bjóða:**
- Møguleika fyri altjóða útbúgving
- Spennandi smásøluútbúgving við egnum skúla
- Møguleika fyri arbeiði við stórum avbjóðingum - bæði í Føroyum og á eini av deildunum í útlandinum
- Løn sambært galdandi sáttmála hjá S&K

**Vit vænta at tú ert:**
samstarvsfús/ur, sjálvstøðug/ur, fyrikomandi arbeiðssom/-samur, opin og ikki bangin fyri at siga tína meining

**Kunning um Skemmuna:**
Í Skemmuni starvast 14 fólk. Eisini hevur Skemman deildir í hesum londum: Ísland, Canada, Letland, Litavia og Estland. Ì hesum londum lata vit eisini fleiri nýggjar deildir upp á hvørjum ári. Síðan Skemman byrjaði fyri 17 árum síðan, eru arbeiðsplássini økt støðugt. Í dag eru umleið 500 arbeiðspláss tilsamans á øllum deildunum í teimum 6 londunum.

**Skúlagongd:**
Skúlagongdin fer fram í Danmark.
Gjøgnum samstarvið við Jysk, fáa okkara lærlingar loyvi at koma á Jysk skúlan í Norður-Jyllandi, og tí fáa teir ein nógv størri fakligan kunnleika um okkara vørur, enn ein fær gjøgnum eina vanligan handilsútbúgving.
Skúlin er góðkendur av almennu myndugleikunum.

**Krøv:**
Fyri at gerast lærlingur í Skemmuni krevst FHS-útbúgving ella onnur miðnámsútbúgving.

**Nær skalt tú byjra?**
Lærlingurin skal byrja 1 Septembur.

**Hevur hetta tín áhuga:**
**Send so eina skrivliga umsókn innan 24 Juli til:**

SKEMMAN
Staravegur 7
Postboks 3278
110 Tórshavn
Tel.315588
Mail: skemman@skemman.fo

FA. GRAVSTEINAR




Opið: mánadag – fríggjadag 9[00]–17[00]
annars sambært avtalu.

Vøruskrá kann fáast!

# Nólsoyar skúli

Vegna ov fáar umsóknir verður søkt eftir lærara til skúlaárið 2004/2005. Undirvísingarøkið verður í byrjunnarundirvísingini og/ella 4. til 9. fl. og nakrar tímar í serundirvísing/serligum tørvi.

Tímatalið verður væntandi 26 t/v vegna avlopstímar.

Starvið, sum er tíðaravmarkað skúlaárið 2004/05, verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um starvið frá skúlaleiðaranum á tlf. 327119/527119.

Umsóknir skulu verða skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi leygardagin 24. juli.

**Nólsoyar skúlastýri**
v/Annu Marnu Holm
FO-270 Nólsoy

**Landssjúkrahúsið**
FO 100 Tórshavn

# Lækanskrivari

Á **Skurðdeplinum** er fulltíðarstarv sum læknaskrivari leyst at søkja til setan 1. september 2004 ella eftir avtalu.

**Førleikakrøv:**
- útbúgving sum læknaskrivari
- tænastusinni
- dugir at raðfesta arbeiðið, sum til tíðir er krevjandi
- góð samstarvsevni
- góður røkjuskapur
- teldukunnleiki

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið.

**Nærri fæst at vita** við at ringja til Metu Askildsen, leiðandi læknaskrivara, telefon 304500, lokal 5121, e-postur meta@lsh.fo .

Umsóknarfreistin er 23. august kl. 12.00.

Skivligar umsóknir við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skulu sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
FO 100 Tórshavn

# Summarfrí

Stongt er frá mánadegi 19. juli.
Opið er aftur týsdagin 10. august.

STUÐULSSTOVNURIN
The Faroese Student Grant Fund

Hoyvíksvegur 72
Postsmoga 3279
FO - 110 Tórshavn
tlf. 356800 - fax 356801
teldupostur: studul@studul.fo